# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantarnir í 1902

Konfirmantarnir 5. oktober 1902. 26 konfirmantar blivu fermdir í Havnar kirkju tann 5. oktober 1902, 14 dreingir og 12 gentur. Á myndini eru 13 dreingir og 12 gentur, t.v.s. at á myndini manglar ein drongur. Av teimum 6 dreingjunum sum standa aftast, kenna vit bert nr. 1 og 2, teir eru: Rubek Rubeksen (Havn), og Hans Christoffer Müller (Havn).

Teir 7 sum standa næstaftast: ókendur, ókendur, Johan Hans Jacob Niclasen (Hestur), Herluf Lützen (Havn), ókendur, Emil Wejhe (Havn) og ókendur.

Av teimum 8 gentunum, sum sita næstfremst, kenna vit onga, og av teimum 4 gentunum, sum sita fremst, kenna vit bert gentuna uttast t.h., tað er Sigga Marie Danielsen (Hestur).

Gentukonfirmantarnir, vit mangla at navngeva, eru: Anna Christine Christiansen, Jensine Frederikke Gjoveraa, Juliane Jacobine Hansen, Anna Magdalene Diana Hansen, Jensine Lovise Hansen, Sigrid Torbjørg Mohr, Mary Mohr, Jacobine Sofie Pouline Jacobsen Mikkelsen, Mikala Poula Maria Poulsen, allar úr Havn, og Hansine Johanne Petra Holm (Nólsoy) og Frederikke Johanne Samuelsen (Kirkjubøur).

Dreingjakonfirmantarnir eru: Jakob Christiansen, Johan Sofus Christiansen, Christian Sofus Johan Helenices Danielsen, Carl Daniel Pauli Egholm, Svend Stefanus Ferdinand Svendsen, allir úr Havn.

Síðani koma: Johannes Jakob Jakobsen (Nólsoy), Bertel Jakobsen (Kaldbak), Hans Joen Henrik Torbak (Nólsoy) og Ole Theodorius Reinert (Norðradalur).

Vit heita á lesararnar um at siga frá um tit kenna onkran av konfirmantunum. Vinarliga ringið tel. 314647 ella 214647. Birgar Johannessen.



## Misskilja 60 km/t skeltini

**Í sambandi við, at vit týsdagin skrivaðu um 60 km/t skelting, hevur lesari vent sær til blaðið og spyr, hvat er galdandi, tá komið er út um aftur fjølbygt øki**




FERÐSLUTRYGD

Í sambandi við, at vit týsdagin greiddu frá týdninginum av føstu 60 km/t skeltunum, ið fyri stuttum vórðu sett upp við Gøtugjógv, í Søldarfirði, á Skipanesi og í Sandavági, hevur blaðið fingið hendan fyrispurning:

Hvør ferð er galdandi, tá komið er út aftur um fjølbygda økið?

Svarið er, at tá tú kemur út um skeltið „fjølbygt endar" kanst tú aftur koyra við vanligari ferð upp til 80 km/t. Tað vil siga, at 60 km/t bert er galdandi, tá tú koyrir inn ímóti fjølbygdum øki.

### Set ferðina niður

Endamálið við niðurskeltingini er at fáa ferðina nakað niður, áðrenn koyrt verður inn í bygda økið. Hetta er ikki neyðugt, tá koyrt verður úr fjølbygda økinum, og tí er tá loyvt beinanvegin at fara upp á 80 km/t.

Í fjølbygdum øki er 50 km/t ferð altíð galdandi, um ikki onnur ferð er ásett við skeltum.

60 km/t skeltini eru ein niðurskelting á 80 km/t økinum, sum eisini verður nýtt aðrastaðni, har stórar ferðsluæðrar ganga ígjøgnum bygd økir, og trupult er at fáa tey ferðandi at virða ferðmørkini.

### Ansa eftir koyrikortinum

Vit vilja eisini enn einaferð minna lesaran á, at koyrir tú skjótari enn 80 km/t á strekkjunum, har 60 km/t er ásett, sleppir tú ikki við eini bót, men skalt upp til nýggja koyriroynd, áðrenn 3 mánaðir eru farnir - og tú missir koyrikortið treytað í 3 ár.

Tað er nevniliga so, at har tað við skelti er ásett at vera lægri ferð, enn vanliga galdandi hámarkferðin, skalt tú bara koyra 20 km/t ov skjótt fyri at nevndu avleiðingar gerast virknar – og ikki 30 km/t, sum vanligt er.

Ljósið í miðbýnum:

## Børn, fimleikur og rørslur í hásæti

**Fimeleikafelagið Ljósið verður aftur í ár í miðbýnum við sínum hugnaliga familjutiltaki, nevniliga leygardagin 10. juni kl. 10.00-16.00.**

TÍÐINDASKRIV



Nógv teir flestu limir felagsins teljast millum børnini, og royna vit eins og undanfarin ár at seta tey í miðdepilin við at hava tilboð, ið fyrst og fremst eru ætlað teimum, t.d. "káti køkurin", har tú fært eitt smáting aftur fyri at knúsa okkurt postalín, "gloyp við glúpi", har tú sleppur at glúpa teg til eina gávu í ordiligum vatni, kasta við vatnbumbum eftir klovni, andlitsmáling, tombola og ymiskt annað.

Fimleikur er okkara fremsta endamál, og vilja vit bæði eggja til rørslu og vísa eitt sindur av tí felagið stendur fyri, og verður tað gjørt við, at íðkarar felagsins framføra can-can, hipp-hopp, meðan FM-vinnarar í amboðum sýna brøgd. Harafturat sleppa børnini at royna nýggju luftbreytina, ið verður kristnað leygardagin, - hon er 14m long og júst komin til landið. Tað er kanska eisini akkurát hóskandi hjá Ljósinum, ið framvegis ikki hevur mannsømiligt innivist nakrastaðni, at vit júst taka okkara stásiliga amboð í nýtslu undir bláloftum! Í øllum førum gleða vit okkum og vóna, at fleiri eru áhugað at koma oman í gongugøtuna at gleðast saman við okkum og hoppa og leypa eina rúgvu á breytini.

(GG! næstan allir aktivitetirnir leggja upp til kropsligar førleikar sosum at kasta, medda, koordinera og leypa)

### Familjuhugni

Umframt at børnini hugna sær og garta, kunnu fólk eisini seta seg niður at fáa ein drekkamunn við vaflum, gera sær sneisabreyð á grúgvu, fáa sunkist og annars njóta undirhaldið, ið ungu fólkini í Ljósinum við jøvnum millumbilum framføra.

**Dagurin í morgin**

**9. juni. Primus**, deyður umleið ár 300. Hann var rómverji. Hann og bróðir hansara Felicianus vórðu illa píndir og tiknir av døgum. Primus merkir tann fyrsti.